JRC
Japan Radio Co., Ltd.
Nýtt
FLEET F77
Inmarsat telefon


JUE-410F



JLR-10 GPS Kumpass
NCR-330 Navtex
JSB-196GM GMDSS A2 Radiostøð


*Við 15 áðrum á baki, og uml. 4000 installatiónum umbor á fiskiførðum, er Sodena ein av heinsins førandið framleiðarum av forritum til fiskiskip.*

*Turbo 3000D fæst m.a. við Føroyskum teksti, streym korti fyri Føroyar, til ber eisini at gera síni egnu sjókort til framvísan í 2D/3D.*




Nýtt


Vikmar hevur saman við Sodena útviklað eitt serligt modul til partrolarar, ið m.a. Kann vísa ferð, kós og dýpi hjá makkarinum.
Eisini verður frástøða, peiling, TCPA og CPA víst.

Vikmar
Tel. 35 21 82 - Fax. 35 21 83
Vestara Bryggja - 100 Tórshavn
Email info@vikmar.fo - Web www.vikmar.fo



Nýggja sølufelagið, Sp/F Fofish:

# Skal selja fiskin hjá 16 trolarum

**- Alternativið hjá reiðaríunum er, at tey hvør í sínum lagi seta nøkur sølufólk at taka sær av søluni, men reiðaríini hava so nógv onnur viðurskifti at taka sær av. Heldur enn at seta eitt ella tvey fólk í part, hevur Fofish, sum hevur trý fólk í starvi, átikið sær at selja fiskin og samskifta við skipini um landing, sigur Ábraham Hansen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ábraham Hansen og Leif Høj hava stovnað fiskasølufelagið, Sp/F Fofish. Felagið hevur skrivstovu í Saltangará og er til reiðar at selja fiskin hjá 16 trolarum hjá P/F Beta, P/F Snaraløki og reiðaríunum hjá Osmundi Justinussen.

Avtala er gjørd við reiðaríini um, at felagið skal selja fiskin hjá hesum skipum í fyribils tvey ár. Ætlanin er, at henda avtala skal reviderast alla tíðina.

Báðir stigtakararnir til nýggja felagið hava drúgvar royndir innan føroyskt og partvís útlendskt vinnulív. Ábraham hevur havt alla søluna hjá P/F Beta um hendi í meira enn sjey ár og hevur somuleiðis havt samskifti við skipini um landing. Í sínari tíð arbeiddi hann eisini fyri ein franskan fiskamarknað um at útvega fisk til marknaðin.

Leif Høj hevur verið í starvi sum innkeypari hjá Føroya Fiskavirking í 6-7 ár og hevur partvís tikið sær av sølu. Eisini hann hevur starvast hjá einum útlendskum fiskamarknaði - í hesum førinum í Týsklandi, har hann arbeiddi við at innflyta fisk til marknaðin har.

Tað skerst tí ikki burtur, at hesir báðir hava góðar "kontaktir" og nógvar royndir í samstarvi við fiskakeyparar í Evropu.



*Sp/F Fofish fer at selja fyri eina ávísa provotión, og tí er umráðandi fyri báðar partar, at mest møguligt fæst fyri fiskin.*

## Meira trúverdugt

Ábraham og Leif fara at arbeiða á skrivstovuni í Saltangará saman við einum skrivstovufólki, og endamálið hjá Fofish verður at fáa mest møguligt fyri fiskin og at leggja landingarnar hjá skipunum hjá nevndu reiðaríum til rættist .

- Alternativið hjá reiðaríunum er, at tey hvør í sínum lagi seta nøkur sølufólk at taka sær av søluni, men reiðaríini hava so nógv onnur viðurskifti at taka sær av. Heldur enn at seta eitt ella tvey fólk í part, hevur Fofish, sum hevur trý fólk í starvi, átikið sær at selja fiskin og samskifta við skipini um landing, sigur Ábraham Hansen.

Hann vísir á, at reiðaríini søgdu seg ikki vilja vera við í einum felag, men vildu heldur vera óheft av sølufelagnum.

- Hetta ger eisini søluna meira trúverduga, ikki minst yvirfyri fiskimonnunum, um nakar skuldi sett spurnartekin við trúvirði í samband við søluna. Í hesum førinum er eisini ein skilnaður ímillum veiðiliðið og søluliðið, sigur Ábraham.

## Selja fyri provotión

Fofish fer at selja fyri eina ávísa provotión, og tí er umráðandi fyri báðar partar, at mest møguligt fæst fyri fiskin.

- Sum nú er, er einki beinleiðis samband millum reiðaríini um sølu av fiskinum, og tí verður tað ein uppgáva hjá okkum at fordeila fiskin so væl, sum tilber, so landaðu nøgdirnar gera minst møguligt "fortreð" fyri hvørja aðra sum gjørligt. Hetta skuldi eisini viðvirkað til eina javnari tilgongd av fiski til fiskavirkini og tískil tænt báðum pørtum.

Ábraham sigur, at felagið fer at hava gott samskifti við tey einstøku skipini hjá reiðaríunum.

- Ætlanin hjá okkum var at fara í gongd 1. mars, men hetta hevur drigið nakað út, tí tað tekur sína tíð at seta upp teldur og fáa telefonlinjurnar uppá pláss. Nú eru vit til reiðar at byrja, og tá ið skipini koma innaftur at landa, taka vit okkum av søluni.

Hann heldur, at tað er ein fyrimunur fyri Fofish, at øll skipini, teir skulu samstarva við, eru heimahoyrandi í meginøkinum.

- Tað er møguligt, at vit kundu selt fiskin hjá uppaftur fleiri skipum, men vit halda, at hetta er eitt passaligt tal av skipum.

At enda sigur Ábraham Hansen, at bæði hann, Leif Høj og skrivstovukvinnan eru sera spent, nú virksemið hjá Fofish fer í gongd.



Farec Hotel Føroyar 15 mars
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum

Alt vanligt el-tilfar
Skjót og trygg tænasta
Heildarveitarar av:
· ABB El-motorum
· DANFOSS El-tilfari
· OSRAM/Philips vørum
· NORSELIGHT/IBAK Ljóskastarum
· BEHA HEDO Kabússum
· ÚTGERÐ TIL STÓRKØKAR
· SKIPSKAÐALUM
· FREON

Telefonin svarar alt samdøgrið!
Stovnað 1935
PF LEIF MOHR
Smyrilsvegur 2 · 100 Tórshavn
Tel 311220 · Fax 314862
lm@lm.fo · www.lm.fo